VIÐMERKINGAR

# Føroyar kunnu sleppa upp í part

**Elin Heðinsdóttir Joensen**
*fólkatingsvalevni Javnaðarfloksins*



VAL05

Hóast smáar, so kunnu Føroyar roynast sera knáar! Hesa sannroynd kenna vit frá mongum førum, har Føroyar ikki hava smæðst burtur ímillum størri og sterkari tjóðir, sum á pappírinum áttu at megnað fleiri ferðir meira enn vit.

Javnaðarflokkurin hevur eisini eina sterka trúgv á, at føroyingar megna og vilja gera seg galdandi — eisini í altjóða høpi. Okkum nýtist ikki at bíða eftir ávísum politiskum líkindum, men vit kunnu byrja longu í dag.

Hóast uttanríkispolitikkur er danskt ábyrgdarøki, forðar tað ikki fyri, at Føroyar kunnu fáa ein nógv størri og nógv meira avgjørdan uttanríkispolitiskan leiklut. Tað mest umráðandi er ikki, um Merkið veittrar í New York ella ikki, men hvussu føroyskur politikkur verður framdur í verki.

Uppskotið um trygdar- og verjupolitikk, ætlaða uttanríkislógin og uttanríkissamstarvið geva okkum møguleikar, vit ikki hava havt áður. Ikki minst kann ein virkin føroysk rødd á fólkatingi gera sína ávirkan galdandi, so føroysk ynski og áhugamál ikki detta burtur ímillum.

Tú kanst gera tína ávirkan galdandi við einari atkvøðu, ið tryggjar Javnaðarflokkinum umboðan á fólkatingi. Tá ert tú við til at geva øllum føroyingum eina rødd, ið lurtað verður eftir og sum virðing verður fyri. Tá kanst tú fáa tína rødd á fólkating!

# EITT STERKT EVANGELIUM

**tórbjørn jacobsen**



VAL05

Nú nærkast, og man fær ikki gingið fyri politiskum áhuga. Frisørsalongirnar eru sum kókandi pottar framundir valini. Bráðpannir av alskins signalum. Og tað varð onki undantak í morgun. Úti á Høgabóli. Vit báðir barberurin tosaðu um gamlar dagar. Intensu valfundirnar í Glyvra Bio. Einaferð var hann komin at sita væl fyri, ímillum Jóhan Lamhauge, sála, gamla deknin á Nesi, og Leon Joensen í Gøtu. Og táið bróðursonurin Jákup var komin væl áleiðis, við sínari røðu, legði Jóhan seg inn yvir Jógvan og mutlaði upp í andlitið á Leon: Eitt sterkt evangelium. Hann visti hvar Leon fleyt politiskt, og hann fjaldi ongantíð, at hann ikki helt Fólkaflokkin eiga nakað politiskt evangelium.

Lisbeth L. Petersen er einasta kvinnan, sum er vald á Fólkating av føroyskum veljarum. Og nú hevur hon tikið avgerðina um at gevast. Tað er hennara val. Vit bæði hava verið í mongum víggi, serliga tey fyrstu árini, táið hon gjørdi viðmerkingar til hvørja einastu røðu, sum eg flutti fram á Løgtingi. Hevði eina kenslu av, at hon ræddist attityduna og fasongin. Ov nógv gartan mundi hon halda. Og spennið millum hugsjónirnar brast hvørja ferð. Ikki so løgið kanska, hon hevði sitið við Gamaliels føtur, hjá redaktørinum á Dimmu í ártíggir, og sogið í seg sannføringina um, at ríkisfelagsskapurin var treytin fyri lívi í oyggjunum, ímeðan politiska jørðildið hjá mær bar brá av stykni til alt sum hevði við samband og ríkiseind at gera.

Á heysti 2001 gjørdust vit bæði fólkatingsumboð. Hon valdi sambært sínari sannføring, sínum politiska evangelium, at gerast ein partur av tingbólkinum hjá Vinstra, ímeðan vit báðir Høgni valdu nýbrotið við Norðuratlantsbólkinum, eisini av sannføring, og tí vit hildu, at okkara tjóðskaparpolitiska evangelium best kundi røkjast á henda hátt.

Norðuratlantsbólkurin hevur verið óvanliga aktivur. Tað svitast ikki. Kreddan er greið. Vit stríðast fyri tjóðarrættindunum hjá teimum báðum donsku hjálondunum, sum nú eru eftir. Og tað hevur sæst aftur í fólkatingssalinum. Og aðrastaðir við. Onki hevur verið dult fyri monnum. Lisbeth valdi ein annan leist, sambært síni sannføring, og tað eiga vit at virða, hóast vit ikki taka undir við henni og hennara integratión í stjórnarflokkinum Vinstra. Og at rógva framundir, at hon harfyri ikki hevur verið líka virkin sum vit á Danatingi, tað er tað reina humbukk. Vit ána ikki hvønn leiklut hon hevur havt í sferuni kring forsætisráðharran og hansara menn. Politikkur mátast ikki við tummastokki. Er ein kókandi vera og úrslitini koma táið tú minst varar tað.

Vit skeittu við hvøssum eygum eftir hvør øðrum í byrjanini, men sum fráleið gekst betur, og ræðslan fyri treytaleysa republikanaranum, og mítt styknið til alt sum hevði við samband at gera, brýndist við tíðini. Tað hevur altíð verið gott vinalag ímillum føroyskar fólkatingsmenn, líkamikið hvønn flokk teir umboðaðu, og eftir nakrar fundir, har vit bæði tóku lut, í Odense, í Føroyahúsinum, á militera akademinum í Keypmannahavn o.s.fr., fullu verjugarðarnir, og eg hoyrdi, at hon á einum landsfundi hjá Sambandsflokkinum skuldi hava lýtt onkrum í oyra, at hasin rabiati loysingarmaðurin av Glyvrum helst ikki var so galin allíkavæl.

Skrivi hetta fyri at beina allar misskiljingar av vegnum. Og fyri at takka Lisbeth L. Petersen fyri gott samstarv ta tíðina vit sótu saman á Fólkatingi. Ein óalmindiliga fitt kona, við einum stórum hjarta, serliga fyri teimum veikaru í samfelagnum. Vit stríddust og fara at stríðast sambært hvør sínari sannføring, hvør sínum evangelium. Bæði líka sterk í hvørt sínari trúgv, men hvør ið arbeiddi meira enn hin, tað eri eg ikki maður fyri at taka dagar ímillum. Tað er ongin.

So gott var samstarvið, at hevði eg ikki varskógvað hana tann eina dagin, táið uppskotið um barber-aða og prístalsfrysta blokkin var fyri á fólkatingi, so hevði semjan millum landsstýrið og stjórnina onki mótspæl fingið. Ólag var komið í dagsskránna og tíðirnar hildu ikki, og eg ringdi til hennara, og bað hana koma undan vaðingini á triðju hædd í stundini, skuldi hon verja sambandsáhugamálini og vera einasti opponentur til avtaluna millum Fogh og fullveldislandsstyrið. Demokratiið sigraði. Tann dagin skvisaði hon integratiónina við Vinstra og virkaði treytaleyst sambært sínum sterka evangelium, sum tíanverri liggur so djúpt, ja, alt ov djúpt, í alt ov mongum føroyingum.

## Gjald fyri valgreinar

Eins og tað hevur verið vanligt í tíðini fram til eitt val, fer Sosialurin aftur hesa ferð at taka gjald fyri valgreinar, sum verða settar í blaðið, hetta fram til fólkatingsvalið.

Gjaldið fyri valgreinar er helvtin av vanligum lýsingarprísi.

**Sosialurin**

# Slóða fyri føroyskum fullveldi

**Heidi Petersen**
*Løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflikkin*



VAL05

**Norðuratlantsbólkurin.**

Tjóðveldisflokkurin hevur brotið upp úr nýggjum við at vera við at seta á stovn Norðuratlantsbólkin á fólkatingi. Við at finna saman í ein bólk, ber til at seta í gongd nógv og fjølbroytt upplýsingararbeiði.

Bólkurin kann sigast at hava brotið upp úr nýggjum. Umboðanin á fólkatingi er umdefinerað og hevur fingið nýggjan týdning, og kunna vit við fólkatingsumboðan okkara nú eisini slóða fyri føroyskum fullveldi.

Ikki kann sigast at nógv fekst av skafti hjá fólkatingsumboðunum hjá ABC flokkunum síðani 1998. 16 mál vóru reist av einum Javnaðarumboði, einum Fólkafloksumboðið og einum Sambandsumboðið í 6 ár. 2,6 mál pr. ár. Hetta eru tøl ið tala.

Síðani Norðuratlantsbólkurin var stovnaður í 2001 hevur hann lagt 66 mál fyri fólkatingið. Skipa fyri ráðstevnum, givið bøkur út, givið út ársfrágreiðing fyri Norðuratlantsbólkin, nýtt danskar fjølmiðlar fyri at styrkja um vitan og orðaskifti um Føroyar. Hildið fyrilestrar og kunnandi fundir um Føroyar og føroysk viðurskifti. Alt hetta er við at slóða fyri føroyskum fullveldi.

**Tekniskt samstarv.**

Vert er at gera vart við at Norðuratlantsbólkurin snýr seg um eitt sokallað tekniskt samstarv, har samstarvið gevur møguleika fyri, sambært avtalu millum partarnar, veruliga at føra politiskt upplýsingararbeiðið um Føroyar og Grønland, og tryggja at føroyska fólkatingsumboðanin ikki gerst atkvøðuneyt í donskum flokki, men hetta merkir ikki at føroyingar og grønlendingar skulu vera samdir í øllum politiskum málum. Har stendur hvør fólkatingalimur fríur.

So tað sum fólkaflokkurin førir fram um at við Norðuratlantsbólkinum verður føroyska fullveldiskósin tengd saman við Grønlendska heimastýrinum, er beinleiðis ein misskiljing ella ein vantandi fatan av hvat eitt tekniskt samstarv snýr seg um.

**Rumbul ella úrslit?**

Tað hinir flokkarnir skíra sum rumbul, kalla vit úrslit. Og tey eru ítøkilig, kunnu skjalprógvast og síggjast aftur í útgávum, ráðstevnum, kanningum og reistum málum á fólkatingi.

Men eisini ítøkilig mál, sum at fáa innlit í frágreiðingarnar hjá fíggjareftirlitinum, var reist av Norðuratlantsbólkinum, sum eitt uppskot til samtyktar á fólkatingi, og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur síðani reist málið yvirfyri danska ráðharranum.

Norðuratlantsbólkurin hevur skapt nýggjar møguleikar fyri at innflyta og selja føroyskan mat í Danmark.

Fingið Danmark at broyta støðu til frama fyri Føroyar og Grønland tá Danmark atkvøður um hvalaveiðu á altjóða fundum.

Veitt nógvum føroyingum, sum vóru komnir tvørt fyri, eina hjálpandi hond. Sýnt nógvum ungum føroyingum álit og givið teimum spennandi og mennandi avbjóðingar. Knýtt sambond við og lært av royndum hjá statsleysum europeiskum tjóðum.

Hetta er tað sum aðrir flokkar skíra sum rumbul, men sum eftir okkara fatan er politiskt arbeiði, sum alt hevur givið ítøkilig úrslit. Og hesum arbeiði er Tjóðveldisflokkurin errin av at kunna halda fram við um veljarin setir

X við E 8. februar.